gult14 cyan14 magenta14 svart14



# Kórkonsert á Velbastað



**Ólavur Hátún**



*Kórið Sólarmagn á fyrsta sinni*

*Mynd: Jens K. Vang*

Heitið “Sólarmagn” man enn ljóma kvinnum og monnum lívgandi í oyrum, sum vita til sín aftur í tjóðskaparligu og mentanarligu vekingartíðina her á landi fyri góðum hundrað árum síðan. Tað var kirkjubømaðurin Sverri Patursson, sum eftir háskúlavetur í Danmark og eftirfylgjandi ferðing í Noregi, har menningarhugur og frílyndi um tað mundið blómaði millum ungfólkið, í 1995 stovnaði fyrsta føroyska ungmannafelagið “Sólarmagn”, felags fyri bygdirnar Kirkjubø og Velbastað.

Tað var tí ikki sørt við eisini hesari tilvitan í sinni, at tú leitaði vestur um hálsin at hoyra nýstovnaða “Kórið Sólarmagn” á tess fyrstu almennu konsert í nýggju skúlahøllini á Velbastað.

Hugaligt var at trína inn um gátt, har fullsettur skálin av fróðum lurtarum í øllum aldrum við føgrum góðveðursútsýni út yvir Heystfjørð eyðsýniliga sat og gleddi seg til hesa merkisløtu, nú mentanarligt sólarmagn tykist bragda av nýggjum í hesum siðsøguliga so ríku bygdum fyri vestan.

Skráin var fjølbroytt: kendir føroyskir og norðurlendskir kórsangir, dømi úr eldri europeiskum kórmentum og hartil nýggjari kórtilfar bæði handan hav og aðrastaðni úr heimi. Eisini ljóðføri settu dám á. Pauli Hansen er altíð fúsur at stuðla við sínum musikalska guitarspæli, og strúkarabólkur av musikklærarum — Sámal Petersen og Claire L. Thomsen, violin, Nikolas Kapnas, bratsch og Edvard Nyholm Debes, kontrabass — gav við egnum leikluti tónleikaløtuni professionella tyngd og birti upp undir tónleikakætið kórsins móti endanum á konsertini.

Sum skilst, er tað kórleiðarin sjálvur Fróði Sandoy, sum hevur tikið stigið til at endurrreisa “Sólarmagn” í kórlíki. Fróða kenna vit sum ein sera gávuríkan tónleikara við drúgvum royndum sum kórsangari. Hann hevur tí gott innlit í tað virksemi, hann nú er farin undir, og hartil ta innaru sannføring um tónleik og tekstir, sum er fyrsta fortreytin hjá kórleiðaranum. Eyðsæð er tó, at tú rørsluliga skalt venja teg til at kunna handfara tað ljóðføri, tú hevur kosið tær, so at tú frítt kanst bera fram tann tónleikaliga boðskap, sum bylgist í tær. Í hesum hava allir kórleiðarar støðugan tørv á vegleiðing og royndum.

Um unga kórið er at siga, at tað ber besta møguleikan í sær: reinar og ljómandi kvinnurøddir og mergjaðar mansrøddir í tenorbólkinum. At bara tveir menn myndaðu bassbólkin, báðir avbygdamenn, vísir sjálvandi á ein byrjanartrupulleika, sum tað tó ikki man fara og verða so torført at vinna á, nú medvitið um henda frítíðarmøguleika breiðir seg millum ungdóm við hesa mannafjølgandi vesturstrond.

Samanumtikið er tað at frøast um, at skipaður kórsangur nú eisini ljómar handan Velbastaðháls til gleði og gagn hjá teim einstøku og til frama fyri mentanarliga medvitið og samanhaldið í hesum bygdum.



*Og strúkarar ljómaðu á Velbastað*
*Mynd: Jens K. Vang*

gult15 cyan15 magenta15 svart15

# hygg & hoyr

Frá fríggjadegi 25. mai til hósdagin 31. mai

## Leygarkvøld




*Fyri seinastu ferð í hesi vetrarhálvuni fer leygarkvøldsmanningin í Útvarpi Føroya at fjálga um hjá lurtarum kring alt landið.*

*Seinastu 8 mánaðirnar hava Bjarni Mohr og Dávid Isfeld og restin av manningini í útvarpinum sett sín avgjørda dám á myrku og køldu leygarkvøldini í vetrarhálvuni.*

*Onki er at dylja yvir, at serliga áhugin fyri spurnarkappingini hevur verið stórur. Í vetrarhálvuni hava túsundtals føroyingar roynt at sloppið gjøgnum nálareygað, í spurnarkappingini. Fyri seinastu ferð á hesum sinni verður so enn einaferð høvi hjá lurtarum at royna sína snarvitan, fyri opnari mikrofon.*

*Í undanfarnu sendingunum hevur siður verið, at trý nýggj evni hava verið hvørt leygarkvøld. Av tí at royndir vísa, at størsti áhugin millum fólk var almenn vitan hava vertirnir gjørt av, at øll trý umførini í kvøld fara at snúgva seg um almenna vitan, sum áður hevur verið í sendingunum.*

*Fólk kunnu tekna seg til seinastu umførini í spurnarkappingini á gyltu telefonnumrunum 31 13 82 og 31 13 83, sum tryggja atgongd til kappingina. Fríðunn situr tilreiðar við telefonirnar, sum svara longu kl. 21.00.*

*Ein annar fastur táttur í sendingini hevur verið "Plettskotið", á miðnátt leygarkvøld. Einki er at taka seg aftur í, at navnið á táttinum kom til sín rætt minst ta einu ferðina. Fasti rithøvundi útvarpsins hevur avgjørt ikki lakt fingrarnar ímillum, tá lurtarar hava bílakt eitt lesarabræv frá manningini. Lurtið á miðnátt, tá høvundurin fyri seinastu ferð á hesum sinni hvessir sær pennin, og gestarøðarin sessast við mikrofonina.*

*Hetta, umframt mangt annað forvitnisligt er tað, sum manningin borðreiðir við í kvøld, kl. 22.05, tá vertirnir seta 1. floks undirhald á breddan, og sláa dyrnar á víðan vegg, fyri seinastu ferð í vetrarhálvuni, nú endabresturin er fyri framman.*

## "Á ferð inn í ein nýggjan heim"




## Bestubitar: Krígsdøtur 2:3




## Fierce creatures




## Pernilles Univers




## Sleepless in Seattle




## Jumanji

